## Vestmenningur og Fram rimmar túr



Ísfiskatrolararnir, Vestmenningur og Fram, sum partrola, hava gjørt ein rimmar upsatúr. Teir fóru til fiskiskap mikudagin í síðstu viku, og í morgun landaði Vestmenningur í Vestmanna og Fram á Tvøroyri. Veiðan, sum er góður upsi, liggur um 300 tons, sum er heili 600.000 pund. Skipini vóru til fiskiskap í hálvt áttanda samdøgur. Tað er altíð torført at siga, hvør størsta last hjá partrolarum hevur verið, men tað munnu vera fáir túrar undir Føroyum, sum eru størri enn hesin – um nakar er yvirhøvur. Menn siga, at upsin, sum skipini hava fingið í seinastuni, hevur verið góður. Undanfarin ár hevur hann verið smáur – ja, so smáur, sum menn kanska ikki vita um at siga. Men nógv hevur verið til, og fiskiskapurin hjá partrolarunum hevur í fleiri ár verið støðugur og góður. Spurningurin er so, hvat tað kemur at merkja, sum tíðin gongur, at fiskurin nú er størri aftur.

# Atlantis yvirtekur gullllaksin



*Nú Faroe Seafood bert fer at arbeiða upsa í Vestmanna, hevur felagið selt gulllaksamaskinurnar til Atlantis, sum hevur gjørt stórar íløgur og fer at arbeiða gulllaks í summarhálvuni*

**Faroe Seafood í Vestmenna fer ikki at arbeiða gulllaks, tá ið vertíðin byrjar aftur um mánaðarskiftið apríl/mai. Tá fer Atlantis, sum Tummas Christophersen og Dánjal Jacobsen eiga ein stóran part av, at arbeiða fiskin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vinnulívsmenninir og reiðararnir í Vestmanna, Tummas Christophersen og Dánjal Jacobsen, eru óførir at skapa virksemi í bygdini og í nærumhvørvinum. Nógvir mans hava sína hýru umborð á skipum teirra. Tummas eigur meginpartin av Vestmenningi og Fram (JFK eigur 10%), og Dánjal Jacobsen eigur Vesturbúgvan. Saman eiga teir so eisini Nornagest og Kolumbus. Trolbáturin Skálafossur er ikki gloymdur, men er eisini ein partur av skapandi virkseminum hjá vinnulívsmonnunum í Vestmanna.

Tað eru fá ár síðan, at vinnulívið í Vestmanna saman við øðrum góðum kreftum eisini reistu á føtur P/F Føroya Trol, sum hevur sítt virksemið á havnalagnum.

### Virka gulllaks

Nú Faroe Seafood gevst við gulllaksavirkseminum í Vestmanna, taka Tummas Christophersen, Dánjal Jacobsen og Dánjal J. Andreasen yvir.

P/F Vestmanna Fiskavirki, sum er eitt gamalt felag, eigur Atlantis, har tey áður arbeiddu laks. Teir, sum í dag eiga ein stóran part av gamla felagnum, eru aftur Tummas Christophersen og Dánjal Jacobsen, sum er stjóri í P/F Vestmanna Fiskavirki. Fleiri smærri eigarar eru eisini í felagnum.

Tá ið gulllaksavertíðin byrjar aftur um mánaðarskiftið apríl/ mai, stendur Atlantis við stjóranum Dánjali J. Andreasen klárt at taka ímóti og fer at virka fiskin til útflutnings.

Saman við 1800 tons stóru frystigoymsluni, sum er bygd í Vestmanna, er talan um eina samlaða íløgu, sum liggur um einar 30 miljónir krónur.

Sum skilst, fer Atlantis ikki í beinleiðis kapping við Tavuna í Leirvík um gulllaksamarknaðin, tí ætlaninar í Vestmanna eru meira fjøltáttaðar enn framleiðslan, sum áður var á Faroe Seafood – og sum í nógv ár hevur verið í Leirvík.

Seks skip plaga at fáa loyvi at veiða gulllaks í vertíðini, sum er summarhálvan. Tey eru Vestmenningur, Fram, Eysturbúgvin, Vesturbúgvin og Stjørnan og Polarhav.

Vestmenningar eiga trý av hesum skipum, Vestmenning, Fram og Vesturbúgvan, sandoyingar eiga Eysturbúgvan, og leirvíkingar eiga Polarhav og Stjørnuna.

### Keypt maskinur

Sosialurin hevur spurt Tummas Christophersen, sum eisini er nevndarformaður í Faroe Seafood, um nakað løgið er í, at hann og Dánjal nú yvirtaka gulllaksavirksemi, sum annars var á virkinum hjá Faroe Seafood í Vestmanna.

- Vit arbeiddu við hesi ætlan, áðrenn eg gjørdist nevndarformaður í Faroe Seafood, og nú eru vit klárir at fara í gongd. Sjálvur havi eg hildið meg uttanfyri tær avtalur, sum okkara felag hevur gjørt við Faroe Seafood um eitt nú keyp av tveimum maskinum til gulllaksaframleiðslu.

Tummas Christophersen vísir kortini á, at keypið av maskinunum hjá Faroe Seafood bert er ein lítil partur av samlaðu íløguni í virksemið, sum nú fer í gongd í Vestmanna.

- Men nú eg eri nevndarformaður í Faroe Seafood og ein av eigarunum í nýggja virkseminum, havi eg latið aðrar tikið tær avgerðir, sum snúgva seg um hesi bæði feløgini, sigur reiðarin.

# Misti tamarhaldið á bilinum

**Í gjárkvøldið gjørdi løgreglan í Eysturoy grein 13-kanningar á Skipanesi, har tvær frágreiðingar vórðu skrivaðar og níggju munnligar átalur givnar**

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stutt eftir midnátt í gjárkvøldið fór ein bilur niðan av Rókavegnum í Saltnesi og endaði uppi í skráninginum.

Løgreglan í Runavík sigur, at bilførarin, sum var á veg inneftir, hevur mist tamarhaldið á bilinum.

Eingin mansskaði hendi.

Løgreglan veit ikki at siga, um fleiri fólk enn bilførarin sjálvur vóru í bilinum, tá ið óhappið hendi.

### Grein 13

Í gjárkvøldið gjørdi løgreglan í Eysturoy grein 13-kanningar á Skipanesi.

Einir 35-40 bilar vórðu kannaðir, og løgreglan skrivaði tvær frágreiðingar. Onnur var um bilførara, sum ikki hevði koyrikortið uppi á sær, og hin snúði seg um bil, har dekkini vóru heldur vánalig.

Løgreglan sigur, at níggju munnligar átalur vórðu givnar fyri ymisk viðurskifti, sum kundu verið betri.

- Hesar átalur snúðu seg eitt nú um parkeringsljós, nummarplátuljós og tílíkt, verður sagt í Runavík.



*Eingin mansskaði hendi, tá ið hesin bilurin koyrdi niðan í skráningin á Rókavegnum í Saltnesi seint í gjárkvøldið*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*